Svimja um Nólsoyarfjørð

Lagt verður frá landið úti við Boðanes, haðani leiðin gongur til Nólsoyar

Mynd: Jens Kr. Vang

Fjórða árið á rað verður svomið um Nólsoyarfjørð, og verður hetta komandi leygardag

SVIMJING
Jákup Mørk

Seinnu árini hevur ein av føstu tættunum í sambandi við ovastevnuna í Nólsoy verið, at svimjarar bjóða sjónum um Nólsoyarfjørð av.

Soleiðis verður eisini í ár, og fyrireikararnir hava nú boðað frá, hvussu farast skal fram, um tú hevur áhuga í at vera við í tiltakinum.

Sum so eru treytirnar ógvuliga einfaldar. Tilmelding til svimjingina fer fram hjá Erendi Simonsen á tlf. 310644, og annars er bara vera til staðar við hølini hjá RC felagnum yviri við Strond leygarmorgunin klokkan átta.

Trygdin er í lagi

Tá farið verður undir slíkt átak, er sjálvandi umráðandi, at trygdin hjá mongu svimjarunum er í hásætinum, og hetta er so avgjørt eisini nakað, sum fyrireikararnir eru vitandi um.

Erlendur Simonsen sigur við Sosialin, at tað er ein treyt, at ein bátur er at ansa eftir hvørjum einstøkum svimjara. Talan skal í minsta lagi vera um 6-mannafør, og skulu í øllum føroum tvey vaksin vera við umborð.

Erlendur sigur víðari, at tað er upp til luttakararnar sjálvar at fáa fatur á einum báti, sum kann fylgja teimum, men sum so er ikki neyðugt, at hetta eru fólk við serútbúgving innan trygd. Fyrireikararnir hava sjálvir ein formansbát, sum skal halda skil á tiltakinum, umframt at samarittar frá Reyða Krossi eisini vera til staðar.

Eisini verður hetta á luttakararnar um sjálvir at syrgja fyri, at teir hava útgerð til svimjingina tøka. Vanliga verður svomið í vátdragtum ella serstøkum triatlon búnum.

Fara tíðliga

Sum nevnt, so skulu luttakararnir møta í hølunum hjá RC felagnum klokkan átta á morgni. Vestfallskyrrindi eru longu kl. 10.30 leygarmorgunin, og fyri at svimjararnir skulu hava so góðan – ella lítlan - streym sum gjørligt, verður lagt til brots ein tíma undan hesum. Vanliga hevur tað tikið skjótastu svimjarunum um hálvan annan tíma at svimja teir fýra kilometrarnar til Nólsoyar, og hava tíðirnar so verið upp til hálvan triðja tíma. Dentur verður lagdur á, at svimjingin er fyri øll. Bæði elitu- og motiónssvimjarar.

Steyp verður latið skjótasta svimjaranum yvir um fjørðin, men treytin fyri hesum er, at viðkomandi ikki hevur nýtt fitjur at svimja við, men bann er tó á ongan hátt sett fyri nýtslu av hesum.

Neistin styrkir hópin

Besta mansliðið hjá Neistanum tykist nú aftur at hava ætlanir um at bjóða føroyska hondbóltstoppinum av

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at Neistin sum verjandi føroyameistari bert gjørdist nummar fýra í vetur, tykjast teir bláu úr høvuðsstaðnum nú aftur at ætla sær kós móti heiðursmerkjunum.

Nýtt og gamalt

Liðið, sum í fjør gjørdist nummar fýra, var í stóran mun sett saman av ungum leikarum, sum høvdu fingið sína uppaling í felagnum. Eitt nýtt lið skuldi byggjast upp, vóru boðini, men nú røkist fyri, at liðið kortini hevur leitað sær styrk uttaneftir.

Tó ikki meira enn so. Tveir av teimum trimum leikarum, sum Neistin nú hevur tryggjað sær, hava áður leikt við felagnum, so heilt fremmandir eru teir ikki.

Vit hava áður skrivað, at málverjin frá gullvetrinum, 99/00, Petur Magnusson, aftur verður í Neistanum komandi árið, og nú er eisini greitt, at Heini Joensen, sum hevur verið í Danmark í eitt ár, eisini verður við Neistanum komandi vetur. Heini var toppskjútti í føroysku kappingini tann veturin, so vónirnar til hansara eru uttan iva stórar.

Harumframt hevur liðið nú fingið Hans Áka Dal-Christiansen úr Kyndli í hópin. Hetta er uttan iva ein sera stórur styrkur fyri verjupartin, har Hans Áki seinnu árini hevur verið mettur sum ein sterkasti spælarin í landinum, og eisinin í álopspartinum eigur Neistin at fáa góða nyttu úr evnum hansara.

Hans Áki Dal-Christiansen fer komandi veturin at spæla hondbólt við Neistanum, sum eisini hevur tveir venjarar úr Kyndli

Tríggir úr Kyndli

Umframt Hans Áka, hevur Neistin eisini fingið venjara – ella skuldi mann sagt venjarar – úr Kyndli til komandi uppgávurnar. Talan er um teir báðar, Sophus Dal-Christiansen og Dia Midjord, sum skulu taka sær av ávíkavist kvinnu- og mansliðnum hjá Neistanum.

Teir báðir eru í løtuni einastu føroysku hondbóltsvenjararnir, sum hava lokið triðja elituvenjara skeiðið hjá danska hondbóltssambandinum.

Báðir hava teir annars fingið sína hondbóltsuppaling í Kyndli, so saman við Hans Áka verður talan sostatt um tríggjar kyndlamenn, sum komandi tíðina fara at royna seg í Neistanum.

Annika til Kyndil

Fyrrverandi liðskipari hjá Stjørnuni fer í vetur at spæla við Kyndli

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað hevur leingi verið greitt, at venjarin hjá bestu kyndislkvinnunum komandi árið verður Rógvi Nielsen, sum annars hevur verið hjá Stjørnuni seinnu árini.

Nú er so greitt, at eisini unnustan hjá Rógva, Annika Ljósstein, fer at spæla við Kyndli hetta kappingarárið.

Tað hevur annars ljóðað, at Neistin eisini hevur ligið framvið eftir leikaranum, eins og íslendska ÍBV, sum Annika segði nei takk til í fjør, framvegis hevur havt áhuga í bakspælaranum.

Umframt tilgongdina av Anniku, hevur Kyndil eisini fingið nakað av styrki aftur úr egnum røðum. Marita Hermansen hevði at kalla burðarfarloyvi í fjør, men hon tykist aftur at gerast greitt fyrsta val í málinum í vetur. Harumframt ljóðar at Mena Joensen av álvara er farin at venja. Hondbóltsevni hennara hava altíð verið framúr, men í vaksnu røðunum hevur hon sjáldan gjørt tað stóra við hondbóltin.

Hinvegin hevur Kyndil eisini havt frágongd. Jórun Ludvík, sum seinastu árini hevur verið liðskipari á liðnum, fer komandi árið at spæla við føroyameistarunum úr VÍF.

Annika Ljósstein fer komandi veturin at spæla hondbólt við Kyndli

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD ESCORT 1.8 SPORT
Svartur, 6 ára gamal, 87.800 km., hevur spoylarar, sportfelgur, breið dekk v. m.
Tlf. 310183

OPEL ASTRA 1,7 D
Stationcar til sølu. Árg. 8/95, 129.500 km., hevur sleipikrók, sýnaður 5/01. Sær sera gott út.
Tlf. 283948

BMW 524 TD TIL SØLU
Alu-felgur, sóltak, el-rútar og el-spegl. Bilurin er í góðum standi. Kom og gev eitt boð.
Tlf. 252072

TOYOTA CARINA 1,6
Árg. 89, nýsýnaður, í góðum standi, til sølu fyri 40.000 kr.
Tlf. 320543 - 227518

FORD FOCUS
Svartur Ford Focus stationcar 2.0i. Trend model árg. 07-12-99, 15" Alu felgur við dekkum + píka dekk á felgum. Powerstýring, centrallás, hita í forrútinum, el-rútar, tak boylar, sóltak, CD-spælari, tokulyktir o.a.Bilurin er sera væl røktur og hevur einans koyrt 17.500 Km.
Tlf. 254124 ella 313928

AUDI 100 1,8
árg. '87, koyrt 207.000 km., heilgalvaniseraður, koyrir uml. 10 km/l, til sølu fyri 15.000 kr. Eisini kunnu góð píkadekk á AUDI/VW felgum fáast við fyri 2.000 kr. afturat.
Tel.: 251703

VW PASSAT
VW PASSAT frá 1987, sýnaður í februar 2001 og í góðum standi, til sølu fyri kr. 13.000,-.
Tlf. 314134

NISSAN SIERA 1,2 LX
Aut. gear, árg. 8/90, koyrt einans 46.000 km. Nýsýnaður. Er í góðum standi.
Tlf. 220710

VW MULTIVAN CLASSIC
2400 diesel, árg. 94, 7-pers., orginalt innrættaður, borð o. a. Bilurin er til sølu.
Tlf. 315062

FORD ESCORT
Árg. 88. Nýsýnaður. Er í góðum standi, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 213045

FORD ESCORT 1,6
Árg. 8/97, bilurin er reyður, koyrt 79.000 km., 5 hurðar, powerstýring og sentrallás. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 316814 - 223366

HONDA CIVIC
Árg. 88, Sýnaður feb. 01, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf 371463 - +45 49223103

FORD FIESTA
Árg. 88, sýnaður juni 01, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 316941 - 224570

FORD ESCORT
Árg. 88. Nýsýnaður, er í góðum standi. Til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 213045

CITROEN AX II TRE
Árg. 89, 105.000 km. bíliga til sølu.
Tlf. 254321 - 448923

TOYOTA DYNA 150
2,8 diesel, árg. okt. 98, koyrt 49.000 km.
Tlf. 217800 - 447800

PEUGEOT 306
Til sølu. Ring og hoyr meir.
Tlf. 255569

TOYOTA CARINA II
Árg. 87, 190.000 km. Motorurin er í góðum standi. Góður til eykalutir. Til sølu fyri 4.000 kr
Tlf. 310247 - 220665

TOYOTA COROLLA
Diesel, árg. 86. Nýsýnaður, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

TOYOTA HIACE
Árg. 89 til sølu. Nýsýnaður, er í góðum standi.
Tlf. 215214

TOYOTA CARINA II
Árg. 85. Sýnaður í mai 01, til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 213195

FORD SIERRA 2.0
Árg. 86, sýnaður mars 01, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 445089 e. kl. 18

CHEVOLET MONSA 1800
Árg. 88-89. Bíliga til sølu. Nógvir eykalutir fylgja við. Koblingin er slitin. Nýggj dekk og 4 nýggj píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 216004 - 256630

NISSAN BLUEBIRD 1.8
Turbo, árg. 86, 190.000 km., svartur, 17" sportsfelgur, senkaður, rustfríður, í góðum standi, næstan allir slit deilir skiftir. Tveir turbo eyka bilar uttan plátur kunna fylgja við. Báðir koyra. Eisini kann eitt stórt anlegg fylgja við.
Tlf. 221067

TIL SØLU
HONDA CIVIC 1.5 i LS VTEC SEDAN, árg. sept. 99, 114 HK, koyrt 26.000 km, el-rútar aftan og framman, el-spegl, radio við cd-spælara, 15" sportfelgur + 14" stálfelgur við heilársdekkum. Sera væl hildin. Er metall grønur.
Tlf. 441944 - 256138

CITROEN BX
Árg. 87, uttan plátur til sølu. Bilurin krevur smávegis ábøtur, er annars í góðum standi.
Tlf. 422426

FORD ESCORT 1,3
Stationcar, árg. 87 til sølu. Koyrur, men krevur ábøtur. Nýggjur skermur og ein lykt fylgja við.
Tlf. 255754

CHERVOLET MONZA
Árg. 88 bíliga til sølu.
Tlf. 281176

EYKALUTIR
Eykalutir til Toyota Haice, árg. 87, til sølu. Góður motorur 120.000 km., bakrút, dragihurð, rút, baklúku, gearkass, stýri snekja og annað gott.
Tlf. 210560 - 423572

TIL SØLU
Gear til W transportara 4 trins.
Tlf. 210560 - 423572

DEILIR TIL SØLU
Deilir til Honda Civic 1,5 i (5 hurðaður). Komplettur motorur við gearkassa, hevur bert koyrt 2.000 km. Hurðar og inntrek. Verður selt bíliga.
Tlf. 217406

NISSAN PATROL
Árg. 88, uttan plátur, til sølu møguligani sum deilir.
Tlf. 223111

NISSAN SUNNY 1.6 SGX
Árg. 86, er í góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr. Sýnaður í feb.
Tlf. 224980

TOYOTA CARINA II 2,0 GLI
Árg. 89, hatcback, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 317785

HONDA ACCORD 2,0 EX
Árg. 86. Spoylarar framman, vel, sportfelgur, sleipikrók. Hevur koyrt 250.000 km., er í sera góðum standi.
Tlf. 211235

BMW 316
Ein silvurgráur BMW 316, árg. 96 hevur einans koyrt 80.000 km. Er sum nýggjur. Kom og royn hann. Prísur 145.000 kr.
Tlf. 224668

FORD ESCORT
til sølu. Árg. 4.96
Tlf. 226019

OPEL ASCONA 1.6
Árg. 84 til sølu. Koyrir væl. Hevur fingið nakrar krossar, men kann gerast. Til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 219280

NISSAN URVAN
Árg. 86, diesel til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 441130 - 442017

MERZEDES BENZ 300 D
Diesel, til salg på grund af flytning. 9.000 kr.
Tlf. 424794

16" SPORTFELGUR
1 ára gamlar sportfelgur við 4 holum til m.a. BMW og Opel Vectra til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 227007

2 TOYOTA HIACE
til sølu sum eykalutir. Møguleiki er at gera ein aftur. Báðir fáast fyri 4.000 kr.
Tlf. 220744

NISSAN PATROL 3,3
Turbo, árg. 87. Til sølu sum eykalutir ella til at gera aftur. Klárar ikki gjøgnum sýn. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 220744

SPORT RENAULT CLIO
árg. 94 v/ sportfelgum.
Tlf. 223980

BMW 324 TD STATIONCAR
Árg. 87. Motorur v/ kvittan. Koyrt uml. 90.000 km. Er í góðum standi.
Tlf. 223980

TOYOTA CARINA II 1,6 GL
Reyður, árg. 89 til sølu
Tlf. 444386

NISSAN PATROL 4,2 DIESEL
Styttra modellið, reyður, árg. 89, koyrt 245.000 km. Hevur setur aftan, skrásettur sum persónvognur. Er nýsýnaður og í góðum standi. Prísur 78.000 kr
216409

Amboð

TIL SØLU
Luna SP 1000 trædreygibonkur til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 317414 - 216315

LYFTITONG
Ein lyftitong, tekur 4 kantsteinar á 100 kg. til sølu.
Tlf. 375289

TRAKTORUR
Traktorur Massey Ferguson 165 til sølu. Framleiðslu ár uml. 1978
Tlf. 361504

ELU SAG
Brúkt Elu sag ynskist til keyps.
Tlf. 449088

TIL SØLU
Ein Irus sláimaskina v/ dubultum hjólum og 2 knívum til sølu sum reservadeilir.
Tlf. 422312

Arbeiði

FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

ARBEIÐI
Søkt verður eftir gentu/skúlagentu at arbeiða 2-3 seinnapartar um vikuna, frá kl. 14-17.30.
Tlf. 311484 - 251163

FITT GENTA SØKIST
til at passa húsi, hestum og hundum uttanfyri Randers. Tú skalt helst ikki roykja ella drekka. Gott hevði verði um tú ert yvir 20 ár, og hevur koyrikort.
Tlf. 004586442081 ella 444761 spyr eftir Lindu

FØROYSK AU-PAIR FAMILJA
24 ára gamal fraklendingur, sera áhugaður í søgu og mentan, leitar eftir føroyskari au-pair familju frá september og fram til jóla. Sendið teldupost til
n.huguet@minitel.fr

AU-PAIR
Søkt verður eftir ábyrgdarfullari gentu at arbeiða sum Au-pair í Íslandi í eitt ár frá sept. 01. Tú skalt ansa 2 børnum, gentu 3 ár og dreingi á 7 mør. í Garðabær, tætt við Reykjavík. E-mail: sverrin@consultings.is
Tlf. 00354 5666070 ella GSM 00354 8943050

HJÁLP!!!
Vit sóknast eftir álítandi gentu/konu at ansa eftir dóttir okkara skjótast gjørligt. Hon er sera góð í sær go verður 1 ár í august. Arbeiðstiðin er bert 28 t. um vikuna. Vinarliga ring á tlf. 317009 (arb.) og á
tlf. 319530 e.kl.15 Spyr eftir Ester

VASKIARBEIÐIÐ SØKIST
31 ára gomul kvinna søkir vaskiarbeiði.
Tlf. 448990

ARBEIÐI
Søkt verður eftir fólki at mála. Tú skalt vera minimum 18 ár. Málarin Magnus Zachariasen.
Tlf. 253025

Barnaansing

BARNAGÓÐ KONA/GENTA
Barnagóð kona/genta søkist at ansa eftir dóttur okkara, ið er 9 mør., 4 dagar um vikuna frá umleið hálvum august.
Tlf. 319327

Barnaútgerð

BILSTÓLUR
Vælhildin eitt ára gamal góðkendur Britax bilstólur 0-13 kg til sølu.
Tlf. 311688

TIL SØLU
Bláur Brio barnavognur við lyft, tasku og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr. Dýna og koddi til sølu fyri 500 kr. Babylurtari til sølu fyri 400 kr. Gangistólur til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 423465

HVÍT TREMMUSONG
við madrassu til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 319213

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Grønur Brio koyristólur, væl viðfarin. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 373842

Bátaútgerð

BRÚKTAR HONDSNELLUR
ynskjast til keyps.
Tlf. 375186 - 222893

YNSKIST
Plaststýrihús til eitt 6 mannafar úr Kalbak ynskist til keyps.
Tlf. 374210 - 373450

TIL SØLU
1 stk. fiskiloyvi. 1 stk. ardna 61 HK motor til sølu.
Tlf. 372104 e. kl. 19

DIESEL BÁTAMOTORUR
Lister diesel 8,5 HK við aksilgreiðum.
Tlf. 447484

Bingo

GOTT BINGO
verður í Eydnuni sunnudagin 19/8 kl. 16
Eydnan

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 11. aug. kl. 16
Eldrafelagið borgin

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsunum og sølubúðum kring alt landið. Tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran

Burturm. /funnið

BURTURVILSTUR!
Hevur nakar sæð okkara fitta 3 mør. svart/hvíta kettling, sum bleiv burtur mánakvøldið 30/7. Veit nakar frá honum at siga,
vinarliga ring 316402-310922

BURTURMIST
Tann, ið tók tann stóra gula og bláa dúkin, um hekk á snórinum í Jóanesar Patursonargøtu 43, náttina til 4. aug., ger so væl og hang hann aftur!!!
Tlf. 222137

BURTURMIST
Ein Nokia 3310 fartelefon burturmist í Havn fríggjadagin 27. juli. Telefonin hevur møguliga máling á frontinum. Finningarløn: 400 kr.
Tlf. 457448

KETTA HORVIN
Grástríput ketta hrovin á Norðasta Horniið á ólavsøku. Um nakar hevur sæð hesa fittu kettu, so ring á
tlf. 310760

HÚGVA BURTURMIST
Húgva burturmist á ólavsøku. Hon er heimabundin, ljósareyð og svørt, til gentu uml. 3 ár. Um nakar hevur funnið hana, so vinarliga ring á
tlf. 457785 - 217776

BROSJA BURTURMIST
Ein barna brosja til føroyska búnan er burturmist á teininum kaiøkið og Jónas Broncks tivoliøkið ólavsøkuaftan.
Tlf. 361644

FARTELEFON
Eg havi mist burtur eina fartelefon av merkinum Siemens S35. Hon hevur verið horvin síðani sunnukvøldið. Hevur tú funnið hana, vinarliga ring
tlf. 444420

SVØRT HÁNDTASKA
burturmist á ólavsøku. Taskan er lítil og blonk. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring á
tlf. 224356

BURTURMIST
Eftir sangløtuna (millum kl. 01.00-03.00) ólavsøkukvøld, misti eg brosjuna úr teimum føroysku klaðunum. Hon er stór, oval, úr silvuri við einum føroyskum opali í miðjuni. Brosjan hevur stóran

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frimerki